










# Edvard fyri fyrstu ferð

**Hóast hann telir millum teir mest virknu tónleikararnar í landinum, hevur hann ongantíð spælt á ólavsøkukonsertini. Nú fær hann møguleikan**

DEBUT
*Eyðun Klakstein*

Edvard Nyholm Debess er ein royndur og virkin tónleikari. Hann hevur spælt í øllum hugsandi samanhangum, og hann hevur fingist við alt frá poppi og jazzi til klassiskan tónleik.

Men hóast hann hevur spælt óteljandi ferðir í mentanarháborgini í Havn og í útlandinum, so hevur hann ongantíð staðið á pallinum á ólavsøkukonsertini.

– Eg havi í nógv ár verið granni til konsertina og havi hoyrt tónleikin, men eg havi ongantíð verið á pallinum. Tað er helst tilvildarligt, men nú sleppi eg so at royna tað, sigur Edvard Nyholm Debess, sum verður við í bólkinum Headache Blues Treo.

– Ein spæling er ein spæling, og tú skalt njóta hana. Vit hava onkuntíð spælt fyri 20 fólkum, og tað hevur verið fantastiskt, men nú er so møguleiki fyri, at vit koma at spæla fyri rættiliga nógvum fólkum.

Headache Blues Treo er mannað við Uni Debess, Rógva á Rógvu og Edvard Nyholm Debess.

